# B71 VANN Í SÍÐSTU LØTU

**VODAFONEDEILDIN** Símin Hansen gjørdist stóra hetjan hjá sandoyingum, tá hann í síðsta minutti skoraði sigursmálið í dystinum móti B68. Sigurin hjá B71 hevur við sær at sandoyingar koma burtur av aftasta plássi, samstundis sum toftamenn nú eru blivnir partur at botnstríðnum

Ólavur Øre Hansen

| | |
|---|---|
| B71 | 1 |
| B68 | 0 |

Frøin var stór á sandoyingum eftir dystin. Tey flestu høvdu nokk væntað at dysturin fór at enda málleysur, men Símin Hansen vildi tað ørvísi, tá hann í síðstu løtu fekk prika bóltin framvið B68 málverjanum og í málið. Sostatt vunnu sandoyingar annan sigurin í ár, og fingu trý tiltrongd stig, sum hava við sær at B71 kom uppum niðurflytingarstrikuna.

Samstundis sum tey fegnast á Sandoynni, so mugu toftamenn ásannað, at teir eftir eina góða byrjan uppá kappingina eru blivnir partur av botnstríðnum í Vodafonedeildini. Seinastu fimm dystirnar hevur B68 bert fingið eitt stig, og tað sæst aftur á stigatalvuni, har toftemenn nú bert eru trý stig framman fyri AB á níggjunda plássi.

Samanumtikið var talan um ein javnan dyst, sum var merktur at nógvum feilsendingum og steðgum í spælinum. Av tí sama gjørdist talan um ein rótutan dysti við ósamanhangandi spæli. Tó so høvdu bæði liðini líkinda kjansir, men einasti munur á liðunum var, at sandoyingar vóru neyvari tá tað galt, og tí vunnu teir dystin.

## Rótutur dystur

Tað vóru gestirnir sum høvdu munin í fyrra hálvleiki. Meðan sandoyingar byrjaðu við at liggja langt afturi á vøllinum, so royndu toftamenn at mynda dystin. Hóast yvirvág í spæli, so høvdu gestirnur trupult við at koma ígjøgnum mannsterku verjuna hjá sandoyingum.

B68 komu tó fram til nakrar vandastøður í fyrra hálvleiki, og var tað serliga eftir deyðbóltstøður at vandi var á ferð frammanfyri B71 málinum. Men Bárður Johannesen, sum spældi sín síðsta dyst fyri B71, hevði ikki stórvegis trupulleikar av atsøknunum hjá B68.

Eftir at gestirnir høvdu verið



**UPPUM STRIKUNA**

*Gestirnir royndu at mynda dystin, men sandingar stóðu væl, og hildu teimum burtur frá stórvegis málmøguleikum. Við sigrinum fór B71 uppum strikuna.*

Mynd: Álvur Haraldsen